


# Føroyingar skikkiligast í heiminum

**Av øllum heimsins íbúgvum eru føroyingar teir, sum skikka sær best. Onga aðrastaðni í heiminum sita so fá fongslað sum í Føroyum. Fyri hvørji 100.000 fólk sita 15 føroyingar inni dagliga, og hetta er nógv minni enn nakra aðrastaðni**

Hesi tøl framganga í eini kanning, International Centre for Prison Studies í King's College í London hevur gjørt. Í kanningini luttóku 214 sjálvstøðug lond og ósjálvstøðug øki, har í millum Føroyar.

Hetta er sjeynda ferðin kanningin verður gjørd, og eftir hvørja kanning verður eitt yvirlit almannakunngjørt, ein listi, sum verður róptur World Prison Population List.

Sjeynda útgávan av World Prison Population List, sum kom út fyri kortum, fevnir um tíðarskeiðið millum tíðliga í 2004 og til oktober 2006. Í hesum tíðarskeiði eru umsitingin hjá teim ymsu fongslunum spurd eftir, hvussu tað sær út hjá teimum í mun til talið av innsettum fangum.

Tað eru hesi tøl, sum nú verða almannakunngjørd, og tað er her tað verður staðfest, at fyri hvønn íbúgva er tað ongastaðni í heiminum, at tað sita so fá fólk fongslað sum í Føroyum.

## Bert sjey fólk um dagin

Sambært World Prison Population List sita dagliga í miðal 15 føroyingar inni fyri hvørji 100.000 fólk. Hetta grunda teir á, at tá teir í 4. oktober 2005 spurdu eftir í Føroyum, hvussu nógv sóta inni dagliga í miðal, var svarið 7 fólk. Samstundis varð upplýst, at tað búðu 47.000 fólk í Føroyum tá.

Hetta tal er nógv minni enn hjá nøkrum øðrum landi á listanum. Føroyar liggja langt aftast, men fyri einaferð skyld er tað flott at liggja aftast. Føroyar liggja eisini langt aftri á listanum, tá tað kemur til PISA-úrslit og styrkilistan hjá FIFA, men tað er vanliga ikki nakað, vit eru errin av.

Londini, ið liggja næst okkum á listanum, eru Nauru og Burkina Faso. Har sita dagliga 23 fongslaði í miðal um árið. Onnur lond, sum liggja aftarlaga eru Liechthenstein, Sierra Leone og Mali.

## USA fremst

Ísland er næsta grannaland okkara á listanum. Har sita í miðal 40 fólk inni dagliga fyri hvørji 100.00. Í Noreg er talið 66, Danmark 77 og Svøríki 82.

Ikki óvæntað liggur USA fremst á listanum. Langt fremst. Har sita dagliga 737 fangar fyri hvørji 100.000 fólk. Næst fremst er Russland, har í miðal 615 fólk sita inni um dagin fyri hvørji 100.000.



*Onga aðrastaðni í heiminum sita so fá fólk í fongsli sum í Føroyum*

*– Eg náddi at staðfesta at kreppa hevði rakt Føroyar, áðrenn eg fór frá, men loysnin á kreppuni varð latin upp í hendurnar á Nyrupstjórnini. Men eg haldi, at eg hevði verið nakað væl skrappari enn Nyrup var.*

*Poul Schlüter, fyrrverandi forsætisráðharri*

*– Vit vita øll, at tað finst ongin verulig javnstøða her í Føroyum. Eitt nú eru vit sum samfelag líka ússalig á hesum øki, sum eitt so tilafturskomi land sum Afghanistan, so tað er hart tiltrongt at seta kvinnukorini á breddan.*

*Lena L. Mohr, blaðstjóri á Kvinnu*

## Kongaligan heiður

Føroysku hjúnini Erna og Njál Djurhuus fingu norska heiðurin "kongens fortjensmedalje i gull" fyri teirra áhaldandi arbeiði millum tey fátøku og rúsevnismisnýtarar í Oslo. Nógv hava lagt merki til teirra stóra arbeiði – og teirra millum eru eisini Haraldur kongur og Sonja drotning.

– Hetta var ikki í okkara tonkum, at vit skuldu útnevnast til nakað slíkt. Tað kom sum ein bumba á okkum bæði tvey, tá vit ein dagin í januar fingu telefon við boðunum um, at avgerð var tikin um at geva okkum hendan heiðurin, sigur Njál Djurhuus.

## Karstin valdi smala vegin

Tað var gjørt nógv burtur úr, tá ið løgtingsmaðurin Karsten Hansen fór úr Tjóðveldisflokkinum og ætlaði sær upp í ein annan flokk. Valið fall á Miðflokkin.

- Summi halda, at eg havi tikið eina øra avgerð, men eg hvíli í hesi avgerðini, og eg eri sannførdur um, at eg havi valt rætt. Eg hevði eisini aðrar møguleikar, men hetta var tað rætta fyri meg, hóast eg havi traðkað á tunnan ís og ikki veit, hvussu mín politiska framtíð nú verður, sigur Karsten Hansen.

## Navigator á land

Størsta fiskiskipið í flotanum rendi á land, tá ið tað var á veg til Klaksvíkar eftir góðan túr. Atlantic Navigator kom at standa á landi á Kunoyarnesi, men alt spældi væl av. Skipið var sleipið leyst aftur eftir nakrar tímar og legði at bryggju í Ánunum.

- Tað var eitt sindur undarligt at standa soleiðis uppi á landi, men eg legði ikki merki til nakran panikk. Øll vóru púra rólig, sigur Símun Pauli Viðbjørg, sum var ein av manningini.